# KT-leiðari

SEV sóknast eftir einum KT-leiðara at seta í starv skjótast tilber.

KT-økið hjá SEV er umfatandi og í støðugari menning, og KT-leiðarin skal samskipa og ganga á odda fyri hesi menning.

Vit sóknast eftir einum KT-leiðara, sum hevur góð samstarvs-evni, ein jaligan hugburð, dugir at bera fram síni sjónarmið og boðskapir, er tænastusinnaður, uppsøkjandi og megnar at hava fleiri bóltar í luftini ísenn.

Ráðgeving og samskipan eru lyklauppgávur. KT-leiðarin skal ráðgeva leiðslu og starvsfólkum í KT-spurningum og samskipa undirvísingina á økinum.

Uppgávurnar hjá KT-leiðaranum verða millum annað at umsita, viðlíkahalda og dagføra servarar, telduskipanir og netverk, at dagføra og gera mannagongdir og politikk innan KT-økið, at luttaka í verkætlanum, har KT hevur ein leiklut, og vera við í arbeiðinum at gera fíggjartilmæli fyri KT-økið.

Vit ynskja, at tú ert teldufrøðingur ella hevur aðra viðkomandi fakliga útbúgving, hevur royndir innan KT-trygd og krøv og hevur leiðsluroyndir.

KT-leiðarin hevur tilvísing til stjóran, og starvið verður lønt sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Hevur tú hug at taka ímóti hesi avbjóðing, ert tú vælkomin at senda umsókn við prógvum og øðrum til SEV. Freistin at søkja er týsdagin 22. september 2009 kl. 12.

Hevur tú spurningar, ert tú vælkomin at ringja til Hákun Djurhuus, stjóra, ella Oluffu undir Kletti, starvsfólkaleiðara, á telefon 346800.

SEV

ELFELAGIÐ SEV
LANDAVEGUR 92
POSTSMOGA 319
110 TÓRSHAVN

Veitst tú eina góða?

Ring til Sosialin tlf 341800





Altíð tað nýggjasta

www. sosialurin.fo




## SEPTEMBER KAPPINGIN

Hvønn dag í august mánaða verða Sudoku uppgávur at finna í Sosialinum.

Jú fleiri uppgávur, ið tú hevur loyst, tess størri møguleika hevur tú at vinna.

Sendið okkum loysnina innan fríggjadagin 2. oktober 2009 kl. 10.00 og viðmerkið brævbjálvan »Sudoku«.

Drigið verður fyrstu vikuna í oktober. Fyri at vera við í kappingini, skal øll uppgávan verða loyst.

Cosméto vakurleiki og vælvera

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | 5 | | | 6 | | | |
| | | | | 3 | | | | 8 |
| 8 | 6 | | | | | 1 | | |
| | 5 | | 4 | | | 6 | | |
| 7 | 4 | | | 5 | | | 2 | 1 |
| | | 2 | | | 7 | | 8 | |
| | | 4 | | | | | 3 | 7 |
| 2 | | | | 1 | | | | |
| | | | 7 | | | 4 | | |

**Navn:**___________________________

**Bústaður:**___________________________

**Telefon:**___________________________

Sendið til: Sosialin · Boks 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan »Sudoku«

SUDOKU

Sosialurin